

**FORD MONDEO 2.0 TREND** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BM 135 **Km:** 92.000
**Árgangur:** 01.02.02

**Kr. 128.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 AUT. STW. SOL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** GP 789 **Km:** 140.500
**Árgangur:** 23.11.98

**Kr. 85.000,-**



**LEXUS GS 300 AUT.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AR 777 **Km:** 66.000
**Árgangur:** 06.07.01

**Kr. 298.000,-**



**HONDA ACCORD 1,6**

**Skrásetingarnr:** PT 777 **Km:** 116.000
**Árgangur:** 26.01.01

**Kr. 78.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.0 D4-D TERRA** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BV 550 **Km:** 151.000
**Árgangur:** 01.11.00

**Kr. 108.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2.4 AUT. SOL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KP 008 **Km:** 19.000
**Árgangur:** 14.06.06

**Kr. 290.000,-**



**CITROEN XSARA PICASSO 1.6**

**Skrásetingarnr:** EU 208 **Km:** 93.000
**Árgangur:** 07.11.00

**Kr. 78.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1.8 AUT. SOL STW.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PK 326 **Km:** 30.000
**Árgangur:** 13.03.06

**Kr. 248.000,-**



**OPEL VECTRA 1.6**

**Skrásetingarnr:** AV 947 **Km:** 65.000
**Árgangur:** 17.04.02

**Kr. 78.000,-**



**TOYOTA YARIS 1.3 V/KOMF.** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KD 102 **Km:** 45.000
**Árgangur:** 21.05.04

**Kr. 115.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum - landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F




*Tøppur kom í ferðsluna á ovara veg á Tvøroyri leygardagin, tí ein nósi lá mitt á vegnum*
*Mynd: D. Olsen*

# Vilstur nósi

**Tøppur kom í ferðsluna á ovara veg á Tvøroyri leygardagin, tí ein nósi lá mitt á vegnum. Ongin dugdi at siga hvaðani hann kom, og í fyrstuni var líka við, at fólk hildu hann vera dotnan av bláum himni, tí hvat skuldi ein nósi gera so langt frá sjóvarmálanum? Men sum so ofta, so er ein rímulig frágreiðing, ið loysti gátuna**

NÓSI
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hann var ikki lættur at fáa eyga á, tann grái nósin, ið lá á grásvarta asfaltinum oman fyri FK handilin á Tvøroyri leygardagin. Men bilar og fólk støðgaðu og spurdu seg, og hvønn annan, hvaðani hesin mundi koma og hvat hann gjørdi so langt burtur frá sínum vanligu - og heldur váttligu - umstøðum?.

Tað bleiv ringt í eystur og vestur, og myndugleikar fingu boð, men tey flestu mundu halda fólk vera blivin frá sær sjálvum, ella at talan var um eina roynd at arga og lumpa.

Nósin ók eina løtu á vegnum, og legði so leiðina oman í grasið niðanfyri vegin.

Men sum so ofta, so er ein skilagóð frágreiðing. Tvær smágentur, ið komu framvið, vistu at siga fjøldini, at abbin, ið búði tætt við, hevði havt nósan heima við hús, og at hann var á veg eftir honum. Og rætt var. Maðurin fór við nósanum, hesin leikurin var av og ein frágreiðing var nú uppá, hvussu hesin nósin endaði so ovarliga á alfaraveg. Hann var stutt sagt rýmdur heiman.

# Danir vilja hava smærri skúlaflokkar

**Nú er nóg mikið við ovurfyltum floksstovum. Hetta siga donsk skúlafólk og politikar. Tí eigur mest loyvda næmingatalið at vera 22 og ikki 28, sum tað er í dag**

UNDIRVÍSING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

- Tað er heilt ótopiskt at halda, at ein lærari við 25-28 næmingum í flokkinum røkkur at taka atlit til hvønn einstakan og hava eina næmingatillagaða undirvísing, sum er kravið í dag, siga røddir fyri politiskar flokkar í Danmark.

Í miðal er næmingatalið í hvørjum flokki umleið 20, men serliga í býunum er næmingatalið nógv hægri enn 20.

Á heimasíðuni hjá Skúlablaðnum, er støðdin á flokkum til viðgerðar.

- Størri ein flokkur er, størri er vandin fyri, at tað gongur galið, at børnini fáa strongd og happa hvønn annan, og at lærarin missir tamarhaldið, sigur John Aasted Halse, barnasálarfrøðingur.

- 18-22 næmingar er tað besta sambært fleiri kanningum, sigur Per Kjeldsen, leiðari av námsfrøðiliga tankatankanum Sophia.